# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- So leingi USA hevur hermenn í grannalagi okkara og styðjar Ísrael, hava vit einki at tosa við USA um*

*(iranski forsetin)*

# Fritzl visti hvat hann gjørdi

**Eysturríkskir sálarfrøðingar siga, at Josef Fritzl er ikki sálarsjúkur. Hann visti, hvat hann gjørdi, og hann er egnaður at sita í einum vanligum fongsli**



*Josef Fritzl verður kanska skuldsettur fyri dráp*

*(Mynd: Polfoto)*

Josef Fritzl gjørdi tað, sum fáur dugir at ímynda sær: Hann burturflutti sína egnu dóttir, hevði hana sum fanga í kjallaranum í áravís, misbrúkti hana og fekk fleiri børn við henni. Men hóast fáur dugir at ímynda sær nakað slíkt, eru eysturríksku sálarfrøðingarnir, sum hava kannað hann, á einum máli um, at Josef Fritzl visti, hvat hann gjørdi, og at hann er egnaður til at taka sína revsing.

Sambært blaðnum Der Standard fer rætturin undir at viðgera sjálvt sakarmálið ímóti Josef Fritzl tíðliga næsta ár. Teir seinastu mánaðirnar hava nakrir av teimum fremstu sálarfrøðingunum í Eysturríki kannað Fritzl. Sálarfrøðingurin Adelheid Kastner, sum hevur staðið á odda fyri kanningunum, vil einki siga um úrslitið, men keldur í løgregluni siga fyri Der Standard, at Josef Fritzl er ikki sálarliga sjúkur.

Eysturríkska ákæruvaldið hevur bíðað eftir frágreiðingini hjá sálarfrøðingunum, og talsmaðurin hjá ákæruvaldinum, Gerhard Sedlacek, sigur við Der Standard, at sjálvt ákæruritið verður liðugt um einar tríggjar vikur. Tá verður væntandi eisini avgjørt, nær málið byrjar í rættinum.

Josef Fritzl fekk seks børn við dóttir síni. Eitt av børnunum doyði stutt eftir føðingina. Fritzl sendi ikki boð eftir lækna fyri at hjálpa barninum, og tí er tað ikki óhugsandi, at hann verður skuldsettur fyri at hava beint fyri nýføðinginum og verður skuldsettur fyri dráp, skrivar Der Standard.

# Nú eta tey rottur í Zimbabwe

**Tann søguliga semjan um valdsbýtið í Zimbabwe hevur ikki ruddað landsins ovurhonds stóru trupulleikar av vegnum**



*Robert Mugabe og Morgan Tsvangirai samdust um at býta valdið, men sambært andstøðuni og ES vil forsetin ikki býta kortini*

*(Mynd: AP)*

Herfyri samdust stjórnin og andstøðan í Zimbabwe um at býta valdið sínamillum, men síðani hava trupulleikar tikið seg upp. Sambært andstøðuni vil Robert Mugabe, forseti, ikki halda avtaluna. Millum annað krevur hann at fáa teir ráðharrarnar, sum hava ræðið á herinum og løgregluni.

ES hevur somu uppfatan av støðuni, og franski uttanríkisráðharrin, Bernard Kouchner, segði í gjár, at ES hevur mist tolið við zimbabwiska forsetanum.

– Verður avtalan ikki fylgd, fara vit at seta okkara tiltøk aftur í verk, samstundis sum vit fara at herða tey, segði Kouchner sambært AP-tíðindastovuni.

Bretski uttanríkisráðharrin, David Miliband, fordømdi royndirnar hjá Mugabe at tvíhalda um valdið.

– Tað er umráðandi, at Evropa sendir tey greiðu boð, at vit vilja ikki góðtaka, at stýrið hjá Mugabe roynir at tiltuska sær alt valdið, segði David Miliband.

Ein danskur tíðindamaður, sum er í Zimbabwe, sigur, at støðan er syndarlig. Inflasjónin er 231 milliónir prosent, og ein vanlig máltíð kostar fleiri milliónir zimbabwiskar dollarar. Tað hevur havt við sær, at nógv fólk í Zimbabwe eru farin at eta rottur og eitrandi nøtir, sigur tíðindamaðurin við danska kringvarpið.

# Fíggjarkreppan kann raka menningarlondini meinast

**Tann heimsumfatandi fíggjarkreppan kann steðga nógvum verkætlanum í menningarlondunum**

Í fleiri menningarlondum sita teir politisku leiðararnir og eygleiða fíggjarkreppuna í tí ríka partinum av heiminum. Teir bera ótta fyri, at leiðararnir í ídnaðarlondunum hugsa einans um síni heimligu viðurskifti, og at tann fátæki parturin av heiminum verður gloymdur.

– Tað er væl hugsandi, at tað verður truplari at fáa fígging til menningarverkætlanir, samstundis sum fleiri fátæk lond longu hava boðað frá, at teirra útflutningur minkar, sigur indiski fíggjarmálaráðharrin, P. Chidambaram.

Chidambaram, sum tók lut í einari hoyring hjá Heimsbankanum og Altjóða Gjaldoyragrunninum, IMF, í gjár, segði í hoyringini, at fleiri av teimum fátæku londunum eru ikki fyrireikað til at taka avleiðingarnar av kreppuni.

– Menningarlondini fara at líða av nøkrum, sum tey ikki hava skyldina av, segði indiski fíggjarmálaráðharrin.

Undir hoyringini kom fram, at fleiri av menningarlondunum kenna seg sett uttanfyri ella gloymd í altjóða fíggjarkreppuni.

## STUTT SAGT

# Høvundur var kanska svíkjari



*Milan Kundera vísir øllum skuldsetingum aftur*

*(Mynd: DR)*

Ein søgustovnur í Kekkia vil vera við, at tann kendi, kekkiski rithøvundurin Milan Kundera var kanska orsøkin til, at ein vesturlendskur njósnari bleiv tikin í Kekkoslovakia í 1950. Kundera avsannar alt.

Søgustovnurin er komin fram á eitt skjal, sum løgreglan í tí kommunistiska Kekkoslovakia skrivaði. Har stendur, at í 1950 fekk løgreglan upplýsingar frá Milan Kundera, og at hesar upplýsingar hjálptu løgregluni at handtaka ein vesturlendskan njósnara.

Sambært skjalinum æt njósnarin Miroslav Dvoracek, sum njósnaðist ímóti tí kommunistiska stýrinum í táverandi Kekkoslovakia. Stutt eftir handtøkuna bleiv hann dømdur 22 ára fongsul.

Milan Kundera sigur seg vera skelkaðan av tíðindunum um, at hann skal hava arbeitt fyri tað gamla kommunistastýrið. Hann vísir øllum aftur og sigur, at hann visti einki um hetta málið fyrr enn nú, og at hann hevur ongantíð hoyrt um tann vesturlendska njósnaran fyrr enn nú. Kundera leggur søgustovnin undir »eina drápshóttan ímóti einum rithøvundi«.

Rætiliga nógvir kekkar arbeiddu fyri tað gamla kommunistastýrið, og Kekkia var eisini tað fyrsta av teimum fyrrverandi kommunistisku londunum, sum almannakunngjørdi nøvnini á hesum samstarvsmonnunum, eftir at Múrurin var fallin í 1991, skrivar AP.